# Javnaðarfólk eiga at savnast

JOHN JOHANNESSEN



**Vit mugu halda fast í sermerktu javnaðarhugsjónini um frælsi, javnrætt og samhaldsfesti og taka hesa týdningarmiklu heild fram um ósemjur um tíðarætlanir í einstakum politiskum málum. At venda flokkinum og harvið trygdini fyri vælferðarsamfelagnum bakið, er eftir míni metan ein ov vágin og illa umhugsaður atburður**

Orsøkin til stovnanina av Javnaðarflokkinum í 1926 var, at nú skuldu viðurskiftini hjá vanliga fólkinum á skrá. Hinir borgarligu flokkarnir keglaðust um loysing og samband, uttan at teir veruliga høvdu viðurskiftini hjá vanliga føroyinginum á dagsskrá.

Eyðkennið hjá Javnaðarflokkinum frá fyrsta degi var, at hann sá politisku málini í einari samanhangandi heildarmynd um økta vælferð og harvið frælsi hjá tí einstaka í felagsskapinum við onnur. Hetta við heildarpolitikkinum var eisini dygdin hjá Javnaðarflokkinum fram um hinar flokkarnar.

Millum punktini í fyrstu politisku skrá Javnaðarfloksins vóru krøvini um nýggja og fólkaræðisliga útbúgvingarskipan, umfatandi almannaverk, útstykking av almennari jørð til fæloysingar og mong onnur mál, sum beinleiðis tóku støði í livikorunum hjá vanliga føroyinginum. Og millum kendastu úrslitini av hesum politikki man vera fólkapensjónin, sum Javnaðarflokkurin fekk í lag.

**Livikor í vanda**

Eisini í dag, góð áttati ár eftir stovningardagin, er brúk fyri einum flokki, sum í tíðarhóskandi ljósi dugir at verja lívskorini hjá tí einstaka. Hækkandi renta, hækkandi oljuprísir og hækkandi matvøruprísir eru millum tey viðurskifti, ið gera, at stórir bólkar í samfelagnum eru bangnir og av álvara kenna lívskorini hótt.

Støðan í sjúkrahúsverkinum, í pørtum av vinnuni og í fíggjarheiminum gevur eisini fleiri orsøkir til at kenna tað, sum at sjálvt vælferðarsamfelagið er í vanda.

Støðan í fiskivinnuni orsakað av lækkandi fiskaprísum, minkandi fiskastovnum og hækkandi oljuprísum merkist serliga í suðurpartinum av landinum, har inntøkugrundarlagið hjá arbeiðaranum, vinnuni og kommununum hvørvur.

Avleiðingarnar av hækkandi rentuni, matvøruprísunum og oljuprísunum merkjast eina mest í miðstaðarøkinum, har familjur og einstaklingar hava verið noydd at seta seg í ovurhonds stóra skuld, fyri at fáa tak yvir høvdið til seg og síni. Men eisini merkjast avleiðingarnar av álvara hjá pensjónistum og øðrum láglønarbólkum um landið alt.

**Politikkur á dagsskrá**

Alt hetta eru álvarsom viðurskifti, ið krevja politiska viðgerð og ikki minst krevja tey politiskt dugnasemi og støðufesti.

Higartil hevur ikki borið til at viðgjørt avbjóðingarnar, hvørki í samgonguni ella í Javnaðarflokkinum. Orsøkin hevur verið eitt endaleyst stríð um eina dagfesting í ávísari verkætlan.

Verkætlanini hevur tingbólkur Javnaðarfloksins fleiri ferðir samtykt at taka undir við, men við neyðugum og ábyrgdarfullum fyrilitum. Enntá hevur eydnast at tvungið samstarvsfelagar okkara í samgonguni at taka undir við verkætlanini, so hon aldri hevur verið so nær og so ítøkilig sum júst nú.

Kortini tykist stríðið skula enda við, at man vil geva flokkin og harvið javnaðarpolitikkin upp fyri skutil orsaka av ósemju um eina dagfesting. Tað er heilt ómetaliga harmiligt – og eisini ábyrgdarleyst.

Men eg veit, at ábyrgdarkensla er nakað, ið eyðkennir okkara mongu limir. So mikið kenni eg javnaðarfólk um alt landið, at tey framvegis kenna eina ábyrgd fyri vælferðarsamfelagnum og harvið ynskja, at Javnaðarflokkurin setur politisku avbjóðingarnar á dagsskrá og finnur loysnir, ið tryggja javnbjóðis møguleikar fyri frælsi hins einstaka í felagsskapinum, líkamikið hvørjum starvi ella øki í landinum viðkomandi kemur frá.

Og nú vit tosa um ábyrgd, so er kanska vert at nevna, at orðini á fyrstu síðu í samgonguskjalinum um fyrilit fyri fíggjar- og búskaparstøðuni ikki bert galda fyri ávísa verkætlan, men fyri øll átøkini, sum eru nevnd í samgonguskjalinum.

Tað kann væl vera, at Javnaðarflokkurin hevur verið og kanska er í einari politiskari kreppu. Men hvør annar kann venda gongdini, enn júst vit øll, sum eru limir í flokkinum og sum velja flokkin. Vit mugu í felag kenna okkara ábyrgd fyri at skapa Fólkaheimið Føroyar. Ongin annar ger tað fyri okkum.

# Verður nakar mettur av at eta skinflugur?

JENS-KJELD JENSEN
fuglaútstappari, Nólsoy



**Aftur eitt stak vánaligt summar hjá fleiri av búfuglunum!**

Nú hava aftur verið hópin av jaligum frásøgnum í Útvarpi og bløðunum um, hvussu støðan hjá búfuglinum fer at verða í 2008. Lítið skil hevur verið í frásøgnunum, men um tað er vegna vánalig tíðindafólk ella vánalig frásøgufólk, skal eg ikki verða tann, ið dømi um…

Enn er ov tíðliga at siga nágreiniliga, hvussu summarið fer at hilnast, men undir øllum umstøðum sær tað aftur út til at blíva eitt stak vánaligt ár.

Eg skilji væl, um fólk hava ilt við at trúgva mær, og serliga, tá ið fiskifrøðingarnir siga, at nøgdin av nebbasild er yvir miðal í ár.

Eg vil her taka fram nøkur dømi, har longu nú sæst, at illa stendur til.

**Ternan:**

Her í Nólsoy tyktist alt verða sum vanligt – men bert í stutta tíð!

Síðst í juni byrjaði ternubølið at vaksa - tað vil siga, at alt fleiri ternur løgdust aftrat stovninum – og tað helt fram 2 tær fyrstu vikurnar av juli. Tann 16. juli lógu fleiri hundrað pør av ternum og bøldu á eggum, sum aldri verða klakt til nakra pisu. Bert nakrar fáar pisur eru væl fyri – feitar og við at verða floygdar. 19. juli byrjaðu ternurnar at geva pisunum ymisk sløg av fiski, og 20. juli flugu í minsta lagi 100 ternur runt og fangaðu skinflugur. Skinfluga er avgjørt **ikki** rættur kostur til eina ternupisu!

**Ritan:**

Her tyktist eisini alt vera í lagi – riturnar bygdu reiður, men hildu so uppat. Bert um helmingurin varp. Tær ið vurpu, vurpu seint, so eisini har koma helst bert nakrar fáar pisur undan í summar.

**Lundin:**

Alt sá sera gott út at byrja við og nógvur lundi var at síggja. Sjálvsagt sást eingin ungur lundi, tí tað eru fleiri ár síðan, lundin hevði nakað gott verpingarúrslit, so eingin ungur lundi er til!

Tá so fleygatíðin byrjaði, sóust nakrir fáir sildberar, og næstu dagarnir løgdust nakrir aftrat, men ikki nógvir.

Eg havi haft høvi at kanna 108 fleygalundar úr Nólsoy og Mykinesi. Kanningarnar vístu, at eingin av lundunum hevði vorpið í summar. Hinvegin vístu kanningarnar, at 62 % af fleygalundunum vóru gamlir fuglar, sum fyrr hava vorpið. Hini 38 % av lundunum vóru allir gamlir lundar, sum ikki áður hava vorpið – hetta eru lundar, ið vóru pisur í byrjanini av í 2000.

Vanlig fleygaár verða sera fáir lundar fleygaðir, sum hava vorpið áður. Ein fleygalundi er sostatt vanliga 2-3 og 4 ára gamal.

Fyribils kanningarnar av fleygalundanum í summar bendir á, at so gott sum allir fleygalundin í ár hevur verið og verður gamal verpingarfuglur, sum ikki hevur vorpið í ár vegna døpur útlit.

Hetta at lundin ikki verpur fleiri á á rað, er ikki løgið - náttúran hevur fyrr prógvað, at hon dugir betur at skyna á um støðuna, enn vit onnur!

Nakrar lundapisur verða floygdar í ár, men tær koma so ikki at vaksa um føroyska lundastovnin!

Tí er tað so ótrúligt og ørkymlandi at hoyra fólk tosa og skriva um, hvussu gott tað sær út hjá føroyska búfuglinum!

Um man skuldi brúkt myndamál um lundan, kundi man eisini sagt tað soleiðis:

Eitt flogfar við 100 fólkum umborð dettur niður, og bert 1 persónur kemur undan við lívinum. Næsta dagin eru allir fjølmiðlarnir á gosi um, hvussu heppin hesin eini var, ið kom undan við lívinum. Somuleiðis verður haft á orði, at um man kann yvirliva nakað tílíkt, nýtist mann ikki at verða ræddur fyri at skula umborð á eitt flogfar. Ikki ein av fjølmiðlunum nevnir hini 99, ið lótu lív í vanlukkuni…

Nólsingar hava friðað lundan í 2 tey komandi árini, men tað bjargar ikki tí føroyska stovninum. Okkara fólkavaldu mugu vakna, og taka stig til at bjarga lundanum eins væl og fleiri av hinum búfuglunum.

**Hvat skal til?**

Eg vil heita á Hagastýrini og fleygamennirnar um at stytta fleygatíðina til bert at verða 2-3 vikur mitt í juli mána. Annars er stórur vandi fyri, at teir fáu lundarnir, sum hava vorpið seint og hava pisu, eisini enda í glúpinum.

At enda: Summarið 2008 verður betri enn í 2007, tá eingin ternu- lomviga- ritu ella lundapisa kom undan. Nakrar lundapisur vóru floygdar í 2004, men vit skulu leita heilt aftur til ár 2000 og 2001, fyri at finna nøkur hampulig ár hjá lundanum!

# The Missing Link

SÍMUN NÓNKLETT



Í februar 2007 setti Landsverk nevnd til at hyggja at bygdanøvnum okkara. Hon varð sett við atliti til bygdaskeltini.

Nú rúm tíð er liðin, síðan álitið varð almannakunngjørt, frættist frá Landsverki, at víðari slepst ikki, av tí at eingin myndugleiki finst her á landi, sum kann geva álitinum grønt ljós, og at tessvegna verður einki skelti broytt.

Mannagongdin tykist løgin. At seta nevnd og løna henni krevur myndugleika. Er hetta myndugleikin, vit hava spurt eftir í fleiri ár? Ella var ein annar myndugleiki, sum gav Landsverki heimild til at seta nevndina og ikki meira enn tað, so farast kundi víðari? Hví hevur Landsverk fingið heimild til at seta hesa nevnd fyri síðan at kvetta á stokkinum og siga, at myndugleikin ikki finst?

Meðan hin samgongan sat, varð spurt ferð eftir ferð eftir myndugleikanum viðvíkjandi staða- og bygdanøvnunum. So løgið tað ljóðar, visti Mentamálaráðið einki. Úr Innlendismálaráðnum var einki at frætta. Ein skuldi trúð, at Matrikulstovan visti um slíkt, men haðani kom heldur einki svar.

Var tað so ikki Vinnumálaráðið, sum sat við myndugleikanum? Hesin stovnur sigst vera yvir Landsverki. Jú, umsíður hildu vit, at nú var komið á mál. Men nú fer at sansa at, tí Vinnumálaráðið sigur, at hetta mál er uttan fyri málsøkið hjá landsstýriskvinnuni. Hvør fer so at autorisera ella góðkenna – ella vraka –nevndarálitið? Hvør var tað so, sum á sinni gav Landsverki heimild til at seta nevndina og løna henni? Liggur myndugleikin kanska í Tinganesi og enn ikki er komin á røttu hillina, síðan málið um føroysk staðanøvn gjørdist føroyskt mál?

At myndugleikin í hesum máli framvegis – í 2008 skal liggja í Danmark er ein ótrúlig undanførsla hjá Landsverki. Sambært bræv frá Kulturministeriet 21. november 2006 er eingin ivi: "Jeg kan i den anledning oplyse, at kompetencen til at autorisere stednavne på Færøerne er henlagt til Færøernes Hjemmestyre". Átti Landsverk ikki fyri langari tíð síðan at fingið greitt myndugleikaspurningin, og í hvussu er, áðrenn nevndin varð sett.

Tá landsstýriskvinnaní Vinnumálaráðnum fer í holt við málið, sum hon hevur lovað, fer hon óivað at finna myndugleikan onkunstaðni. Á Fróðskaparsetrinum, í sjálvari nevndini, ella? – Spennandi verður at frætta.

## Andlát og jarðarferðir

**Herta Adis Bertelsen,** ættað úr Trongisvági, búsitandi í Norðdepli, andaðist mikudagin á Klaksvíkar sjúkrahúsi, 77 ára gomul. Jarðarferðin verður frá kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi leygardagin klokkan 14:00. Tey, ið vilja minnast Adis, kunnu lata Verkstaðnum á Brekku eina gávu, konto í Føroya Banka.

**Tommy Vinther Kjærbo,** ættaður úr Vági, búsitandi í Esbjerg, andaðist hósdagin 17. juli, 46 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum í Havn sunnudagin klokkan 14:00. Tey, sum vilja minnast Tommy, kunnu lata børnunum eina gávu, konto í Eik Banka.

**Annfinnur Djurhuus,** ættaður úr Kunoy, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum týsdagin, 65 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.